# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# ALT OV MONG FARIN Í FERÐSLUNI

Sunnudagin verða aftur blómur lagdar á støð kring landið, har fólk hava látið lív í ferðsluni. Hetta er ein vakur siður, sum Ingi Gunnarsson í Havn av sínum eintingum hevur tikið stig til fyri 10 árum síðani.

Tann fyrsta ferðsluvanlukkan, sum kravdi mannalív, hendi í 1928, tá ein bilur við fýra fólkum fór út av Varmakeldueiði í Eysturoy – og ein teirra doyði. Síðani tá eru eini 270 fólk deyð í ferðsluni. Hóast støðan er nógv batnað, so var tað serliga tey seinnu árini – tá bilnýtslan veruliga tók dik á seg í sjeytiárunum, at ferðsludeyðin gjørdist ein fólkaheilsutrupulleiki. Vit kunnu seta spurningin, um vit taka henda fólkaheilsutrupulleika í nóg stórum álvara – ella um tað bara er tøkniliga menningin hjá bilaframleiðarunum seinastu árini, sum hevur ført til, at talið av deyðum í ferðsluni er lækkað. Helst hava báðar orsøkirnar havt sína postitivu ávirkan.

Nú eru nøkur ár síðani, at løgtingið samtyki sokallaðu 0-hugsanina hjá Ferðslutrygd, hvørs høvuðsendamál er, ein eingin skal doyggja ella verða álvarsliga skaddur í ferðsluni. Hetta er ein vøkur hugsjón við einum sera góðum endamáli. Men tað hoyrist kortini ikki so nógv til hesa hugsjón longur, tó at tað valla er tí, at vit eru komin á mál.

Tá flogvanlukkur henda, hoyra vit um havarínevndir, sum út í æsir kanna vanlukkuna. Men soleiðis verður ikki gjørt í bilferðsluni. Tað er nógv større vandi at doyggja í bilferðslu enn í flogferðslu - tí átti ein havarínevnd at kanna allar álvarsamar ferðsluvanlukkur. Á tann hátt fingu vit staðfest, hví hesar vanlukkur kunnu fáa so álvarsamar avleiðingar – og kundu vit á tann hátt byrgt fyri líknandi vanlukkum. Ein slík skipan er í øðrum londum, eitt nú í Íslandi, har slíkar frágreiðingar verða almannakunngjørdar, so ein og hvør kann gera sína egnu niðurstøðu.



Men sum so mangan, so er tað hugburðurin hjá okkum, sum skal broytast. Tað er hugburðurin til at koyra eftir umstøðunum – til ikki at koyra ov skjótt, tí ferðin drepur. Tað er eisini hugburðurin at brúka trygdarúgerðina – og ikki minst hugburðurin til at læra børnini at respektera ferðslutrygdina.

Jú víst eru nógvir batar hendir umframt tøkniligu menningina í bilaídnaðinum – vit kunnu nevna vegakervið sum heild, rumlufoyrur, ferðgáar og annað. Latið okkum nýta hendan minningardagin til at minnast tey, ið farin eru, við virðing – og til at minna okkum á at lata vit og skil ráða í ferðsluni.

## Eingin doyggja ella verða álvarsliga skaddur

---

# Archibald málaði til drotningina

Tá ið døgurðin var liðugur í Spaniastuvu, sum gestirnir vóru hugtiknir av at vera sera hóskilig, vøkur og søgulig hølir, handaði borgarstjórin, Gunvá við Keldu ein málning frá Archibald Balck til Drotningina.

Borgarstjórin greiddi frá, at Archibald Black er nr. 6 í beinari linju efter Nólsoyar Páll og situr á sama garði, sum hann.

**Nólsoyar Páll** ella **Poul Poulsen Nolsøe**
(f. 11. oktober 1766 í Nólsoy, saknaður veturin 1808/1809) er tjóðarhetja Føroyinga

Hann var sjómaður, bátasmiðjur, uppfinnarir, bóndi og skald.

1 – Apolonia Nolsøe – (Dóttirin) yvirtekur garðin – Apolonia Maria Nolsøe fødd: 1807 - 1889
2 – Hanus á Biskopstø – 1842 - 1921
3 – Jákup á Biskupstø 1867 - 1964
4 – Hans Biskupstød 1896 - 1982
5 – Brita Black 1929
6 – Archibald Black 1956



*Mynd: Dávur Winther*

Archibald er eisini bátasmiður, timburmaður, tónleikari, bóndi – og plagar at verða sagt filosof ella góður at samskifta og kjakast við.

Archibald er virdur, sjálvlærdur listamaður og undirvísur list á kvøldskúlanum.

Málningin kallar Archibald »í Dreymsóljuheimi«.

Borgarstjórin greiddi frá, at býráðið hevði einaferð vitjan av einari damu úr Danmark, sum í tríggjar mánaðir hevði búð og teknað hjá Trampedach. Tá ið hon sá eina av andlitsmyndunum, sum hanga á eini á skrivstovunum í býráðnum, spurdi daman: »Er det Trampedach«?

»Ja« var svarið, »det er vores lokale Trampedach, han hedder Archibald Black«!

*eirikur@sosialurin.fo*



## Valið í ordan

JÓANNES EIDESGAARD
KJAK Á SÍÐU 13



## Tá Bogi fór til Brússel

BOGI GODTFRED
KJAK Á SÍÐU 10

# 5.500% færri ferðafólk

Fyrra hálvár í ár eru 85.945 ferðafólk komin og farin um flogvøllin í Vágum.

Í juni mánaði hava tilsamans 20.349 fólk ferðast um floghavnina. Hetta eru 1,8% færri enn í juni í fjør, tá ferðafólkatalið var 20.731. Afturgongd hevur verið á danmarkarleiðunum við 1,7%, meðan framgongd hevur verið á noregsleiðunum við 11,4%, íslandsleiðunum við 2,3% og bretlandsleiðunum við 3,7%.

Fyrra hálvár í ár vóru tilsamans 85.945 ferðafólk um floghavnina. Hetta er 6,1% færri enn fyrra hálvár í fjør, tá talið var 91.542. Afturgongd hevur verið á danmarkarleiðunum við 7,7% og bretlandsleiðunum við 15,1%, meðan framgongd hevur verið á noregsleiðunum við 57,3%. Á íslandsleiðunum er ferðafólkatalið óbroytt í mun til fyrra hálvár í fjør.

Í juni mánaði komu og fóru 466 flogfør. Tað er 4,5% færri enn í juni í fjør, tá 488 flogfør komu og fóru um floghavnina.

Fyrra hálvár í ár eru 2.118 flogfør komin og farin um floghavnina. Tað er 3,6% færri enn fyrra hálvár í fjør, tá 2.197 flogfør komu og fóru um floghavnina.

Fyrra hálvár í ár er samlaða farmamongdin flutt loftvegis um floghavnina minkað við 9,2% - úr 341,3 tonsum til 310 tons.



**Sosialurin**
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*